# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

100 ára føðingardagur:

## Karin Joensen 100 ár



Leygardagin 10. september 2005 fyllir Karin Joensen úr Fuglafirði, búsitandi á Eysturoyar Ellis- og Røktarheimi, 100 ár.

Í hesum sambandi verður opið hús, sum familjan, heimið og Fuglafjarðar kommuna skipa fyri í felag. Almenn umboð, stýrislimir og umboð fyri bý- og bygdaráðini í Eysturoy koma eisini at heilsa upp á Karina hendan dagin.

Karin Joensen, f. Eliasen, er ættað úr Fuglafirði. Foreldrini vóru Líggjas við Gjógvará og Katrina, fødd Toftegaard. Tey vóru fimm systkin, tríggir dreingir og tvær gentur.

Karin gekk í barnaskúla í Fuglafirði, og sum ung fór hon á húsarhaldsskúla í Havn. Seinni fór hon út at tæna, soleiðis sum vanligt var tá í tíðini.

Í 1934 giftist Karin við Elias Joensen av Skipanesi. Hann arbeiddi í mong ár sum snikkari hjá Jákupi Oluf Jacobsen í Fuglafirði.

Karin og Elias fingu trý børn, dóttrina Rigmor, gift Toftegaard, og Kaj Eli Blábjørg, sum bæði búgva í Fuglafirði, og Charles Fríðberg, ið býr á Argjum.

Arbeiði hjá Karini var at halda hús, og har var nokk at takast við. Tey høvdu nakað av jørð og eina kúgv, so m.a. gekk hon til neytar, burtur í torv og hoyggjaði og gjørdi annars alt sum hoyrdi til eitt vanligt húsarhald tá í tíðini. Hon bakaði breyð, líka til hon fór á ellisheimið.

Tá mamma Karin gjørdist álvarsliga sjúk, fluttu foreldrini inn til tey at búgva.

Karin bleiv einkja í 1989, tá Elias doyði 80 ára gamal. Síðan oktober 1996 hevur hon búð á Ellis- og Røktarheiminum í Runavík.

Likamliga er Karin rímiliga væl fyri, situr í rullistóli, men ikki ber til at fáa samband við hana.

Karin eigur 10 ommubørn og 18 langommubørn.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Finnbogi Ísakson** andaðist mikudagin, 62 ára gamal.

Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum leygardagin klokkan 17.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni sunnudagin klokkan 14.

Tey, sum vilja minnast Finnboga, kunnu eisini lata Føroya Felag móti Krabbameini eina gávu.

**Ella Hansen í Hósvík**, ættað úr Gásadali, andaðist hósdagin 8. september, 87 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Hósvíkar kirkju sunnudagin klokkan 14.

Tey, ið vilja minnast Ellu, kunnu eisini geva Cystisk Fibrosufelagnum eina gávu.

**Maud Heinesen, Tórshavn**, andaðist á Landssjúkrahúsinum mikudagin 7. september, 69 ára gomul. Kistan kemur í Havnar kirkju leygardagin klokkan 19.

Jarðarferðin verður sunnudagin klokkan 16. Tey, ið vilja minnast Maud, kunnu lata Amnesty International Føroya deild eina gávu. Konto í Føroya Sparikassa.

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá okkara kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Jógvan Johansen**
**Eiði**

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til starvsfólkið á B6 og B8, ið vóru um hann.
Tøkk til Emil Olsen, prest, fyri góð orð í kapellinum og í Eiðis kirkju.
Tøkk til Kjartan fyri sangin.
Tøkk til kirkjutænarar, sangarar og gravarar.
Tøkk til øll, ið hjálptu til við ervinum, og til tykkum, ið komu við køkum og øðrum.
Tøkk fyri blómur og kransar, og tøkk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**John, Odny, Magnus og Katrin Maria**

## Alma Frederiksen í Miðvági 99 ár



Sunnudagin 11. september verður Alma 99 ár.

Alma er fødd og uppvaksin í Sandavági. Hon giftist við Sigmund Frederiksen úr Miðvági, og búsettust tey í Miðvági.

Tey fingu 8 børn. Áðrenn átti Alma eina dóttur, so børnini vóru 9 í tali. 5 gentur og 4 dreingir.

Alma og Sigmund stríddust sum so mong onnur við so nógvum børnum. Tey upplivdu bæði gleði og sorg, ein drong mistu tey bert 8 dagar gamal, og ein drong mistu tey 21 ára gamal. Tey fingu eisini ein sjúkan drong, sum fór til Danmarkar, bert 6 ára gamal. So tað hevur ikki altíð verið lætt, men í øllum førum hevur Harrin hjálpt ígjøgnum alt. Alma bleiv einkja í 1980.

Í dag býr Alma á Ellisheiminum í Miðvági. Hon hevur nógv ommubørn, 26 í tali, og 61 langommubørn, 9 oldurommubørn. Eisini har veit hon, hvat tað er at missa síni kæru. Alma hevur áhuga í øllum hesum børnum, hon hevur samband við tey - tey hyggja inn á gólvið, og tey ið burtur eru, ringja til hennara, um tað so er úr Ghana.

Tað sum er so stuttligt við Almu, er at minnið er sum á ungum árum. Tað er so stuttligt at tosa við hana, hon minnist alt, og er forvitin at frætta um tað, sum gongur fyri seg, bæði rundanum hana og alt í bygdini, tað er mangan at hon fortelur okkum tíðindi.

Alma er uppi hvønn dag, og klárar seg fyri tað mesta sjálv, henni dámar væl ítriv og bingo, men eyguni eru ikki so góð longur.

Tað er sera stuttligt at síggja hana í dag, hon er 99 ár, so flott og ferug, ja, sum ein drotning plaga vit at siga, hon hevur jú eisini heilsa uppá drotningina, tað var eitt stórt upplivilsi fyri hana.

Hendan megnar kvinna er mamma okkara. Elskaða mamma, hjartaliga tillukku.

**Elisa og Signa**

Sosialurin Sosialurin i Sosialurin Sosialurin